Viðmerking til greinina um Jenis:

»Jenis fingið hóttanir«

Í greinini um hóttanirnar, sum Jenis av Rana hevur fingið, stóð í einum broti av greinini:

» ... Greinin snúði seg millum annað um samrøðuna, sum Miðflokkurin hevði við Boga Davidsen. Har stóð skrivað, at viðkomandi, hevði helst kvalt Jenis við mikrofonleiðninginum, um hann var journalistur...«

Hervið skal boðast frá, at hetta brotið kann lættliga misskiljast, men gerast skal greitt, at tann »viðkomandi«, ið meint var við, er ikki Bogi Davidsen, men høvundurin av greinini í Fregnum, Jóanes Nielsen.

Ingrid Bjarnastein

Jens, Jim og Elvis í Mentanarhúsinum

Jens Lisberg fer saman við dóttrini Kristel á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 23. november

Leygarkvøldið 23. november verður stór countrykonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Jens Lisberg fer saman við dóttrini, Kristel, at syngja

KONSERT
Ingrid Bjarnastein

Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur longu verið karmur um fleiri konsertir. Og leygarkvøldið 23. november er aftur ein konsert á skránni. Tá verður tað Jens Lisberg, sum fer á pallin saman við dóttrini, Kristel, og saman fara tey at syngja nøgvar góðar og kendar sangir.

Jens Lisberg er millum annað kendur frá bólkinum Sputnik, men sjálvt um Sputnik ikki er til longur, sum er Jens Lisberg framvegis frammi sum sangari.

Konsertskráin hetta leygarkvøldið verður sera víttfevnandi. Millum annað verða løg hjá Jim Reeves, Patsy Cline, Elvis Presley og Whitney Houston at hoyra. Og saman við teimum báðum, Jens og Kristel, verður eisini ein tónleikarabólkur, við nøkrum av fremstu tónleikarunum í Føroyum.

Bólkin manna Edvard Nyholm Debess bassgittar, Ólavur Øster, gittar, Rógvi á Rógvu, trummur, Stamen Stanchev, synthezeisara, Kim Hansen spælur klaver og Petur Hermansen á steel-guitar. Og í kórinum syngja Ruth Skarðenni, Randi Fjalsá og Barbaru á Tjaldrafløtti.

Grundin til, at henda konsertin verður, er at fyrr í vár var konsert í Læraraskúlahøllini í sambandi við, at 30 ár eru liðin, síðani Jens Lisberg byrjaði at undirhalda. Tí varð heitt á tvørámannin at taka hetta væleydnaða tiltakið uppaftur.

Føroysk trivnaðar – og heilsumál – nú og í framtíðini

Ráðstevna í Norðurlandahúsinum í dag og í morgin

Tíðindaskriv

Norðurlandahúsið verður í dag og í morgin karmur um stóra ráðstevnu innan trivnaðar- og heilsumál í Føroyum – bæði nú og í framtíðini

Ráðstevnan fer at snúgva seg um viðurskiftini á trivnaðar- og heilsuøkinum í Føroyum í dag. Hvussu støðan er í løtuni? Og hvussu skulu vælferðartænasturnar síggja út í framtíðini?

Fokus verður sett á nøkur evni: børn, ung, vaksin og eldri. Hesi evnini verða øll viðgjørd hvør sær.

Umframt fyrilestrar er eitt panel sett at viðgera hvørt evnið. Her sita umboð fyri heilsu- og almannaøkið, brúkarar og politikarar. Panelluttakararnir fara at hava eina framløgu í part. Síðani verður kjak, har áhoyrararnir fáa møguleika at seta spurningar ella gera viðmerkingar.

Hugt verður eisini at skipanum í grannalondunum. Doris Hansen fer at greiða frá royndum og fyrimyndum úr øðrum norðurlendskum londum, og fleiri norðurlendskir gestarøðarar verða eisini við.

Eisini fer stjórin á Statens institutt for Folkesundhed í Danmark, Finn Kamper-Jørgensen, at halda fyrilestur hann kallar »Folkesundhed og et godt liv – en udfrodring for samfundet og for social. og sundhedssektoren«. Íslendski landslæknin, Sigurdur Gudmunsson, fer at siga frá um íslendska heilsuverkið og Laila Linden, heilsu- og sjúkrahússtjóri á Bornholm, heldur røðu undir heitinum »Sundhedsvæsenet i Danmarks største regionskommune«. Bo Antonsen, ankechef í »Den Sociale Ankestyrelse« fer at tosa um danska almannaverkið.

Støðið undir ráðstevnuni er arbeiðið hjá Trivnaðar- og heilsumálaráðnum, sum er sett at greina trivnaðar- og heilsuverkið og at gera eitt uppskot til, hvussu vælferðartænastan skal síggja út í framtíðini. At røkka endamálinum hevur ráðið millum annað gjørt eina umfatandi spurnarkanning millum stovnarnar innan almanna- og heilsuverkið.

Greitt verður frá hesi og øðrum kanningartiltøkum hjá ráðnum.

Ráðstevnan byrjar hósmorgunin klokkan 8.30, og verður tað Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, sum setir ráðstevnuna. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, fer at enda ráðstevnuna seinnapartin fríggjadagin. Ráðstevnan er almenn og øll kunnu verða við.

Evnisdagur um trygd á sjónum

Fríggjadagin skipar Føroya Sjómansskúli saman við skipaeftirlitinum fyri evnisdegi um trygd á sjónum

EVNISDAGUR
Ingrid Bjarnastein

Trygd á sjónum er eitt ógvuliga stórt og víttfevnandi evni, og undirvísingin á til dømis Sjómansskúlanum snýr seg næstan bert um hetta evnið. Um hugt verður eftir teimum stóru lærugreinunum á skúlanum, so sum siglingarfrøði, skipstøkni, skipsfyrisiting, sjórætti, sjóreglum, GMDSS og øðrum lærugreinum við, so er felags fyri hesar trygd á sjónum.

IMO og aðrir altjóða stovnar gera í rúgvuvís av konventiónum og resolutiónum, sum snúgva seg um trygdina á sjónum.

Tá evnið er so víttfevnandi, havi Sjómansskúlin saman við Skipaeftirlitinum gjørt av, at hesin evnisdagur um trygdina skal verða eitt afturvendandi árligt tiltak, har fyri tað fyrsta aktuell evni verða viðgjørt umframt ymsa kunning.

Eitt hugskot er, at í framtíðini verður skipað fyri degnum nakað eftir, at løgtingið hevur viðgjørt ta árligu frágreiðingina frá Skipaeftirlitinum, soleiðis, at hon eisini kann vera ein partur av teimum komandi evnisdøgunum.

Evnisdagurin í ár er ætlaður sum eitt byrjunarstig, og verða evnini og tíðin eisini avmarkað.

Fjølmiðlarnir um aldarskiftið

Leygardagin 16. november klokkan 14 letur upp ferðandi norðurlendsk fotoframsýning í Norðurlandahúsinum. Heitið er »Nordis Fotografis Dokument 2000«

FRAMSÝNING
Ingrid Bjarnastein

Talan er um fotomyndir frá norðurlendskum bløðum, sum verða lýstar við norskum teksti.

Fotoframsýningin fylgir við skeiðum um foto og design, sum Nordisk Journalistcenter í Århus skipar fyri í sonevndu nærøkjunum og nú eisini í Føroyum.

Norðurlendska deildin av altjóða felagsskapinum Society for News Design (SND) hevur tikið stig til framsýningina. Upprunin var samstarv undir heitinum »State of the Nation« millum nøggju tey størstu norðurlendsku tíðindabløðini. Kappingarneytar sum Dagbladet og VG í Noregi, Jyllands Posten og Politiken í Danmark, sum tó í dag samstarva, løgdu dagligu kappingina niður. Seks vikur um aldarskiftið lótu bløðini pressumyndir til felags nýtslu og síðani til framsýningina, sum lat upp í Reykjavík í sambandi við SND ráðstevnu í fyrrárið.

Fleiri enn hundrað bløðsíður spurdust burtur úr samstarvinum. Framsýningin er partur av hesum hundrað síðunum. Evnið er gerandislívið, so sum tað er í Norðanlondum. Tilsamans 30 fotografar luttóku hvør við sínum undirevnið, so sum náttúra, átrúnaður, ungdómur og tilflytarar. Framsýningin vísir okkum eitt sjáldsamt innlit í dagligdag og arbeiði hjá pressufotografum í Norðanlondum.

Tey nøggju norðurlendsku bløðini, um við eru í framsýningini eru: Aamulehti og Vasabladet úr Finlandi, Morgunblaðið úr Íslandi, Dagbladet og VG úr Noregi, Aftonbladet og Dagens Nyheter úr Svøríki og Politiken og Jyllands-Posten úr Danmark.

Innan framsýningin letur upp í Føroyum, hevur Nordisk Journalistcenter sýnt hana fram í Kaunas í Litava og í Sankta Pætursborg í Russlandi.

Framsýningin er opin í Norðurlandahúsinum til og við sunnudagin 8. desember.

Lív og glaðir dagar í Vestmanna

Í mai mánaði komandi ár verður bæði sølustevna og bátastevna í Vestmanna. - Vit ætla, at bátastevnan skal bera brá av eini bygdastevnu, siga fyrireikararnir. Vestmanna Kirkjukór og Vestmanna Ítróttarfelag skipa fyri hesum báðum tiltøkunum

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Á sølustevnunum kring landið plagar eisini at vera mótaframsýning, har handlarnir, sum eru við á stevnuni, sýna fram tey nýggjastu pløggini. Á sølustevnuni í Vestmanna í mai verður dentur lagdur á at sýna fram barnaklæði.

Mynd: Beinta Jacobsen

Lítið man vera at ivast í, at komandi mai mánaði verður rættiliga lívligur í Vestmanna. Tí, tá verður bæði sølustevna og bátastevna í bygdini. Sølustevnan verður í døgunum, 2. , 3. og 4. mai og bátastevnan, sum ber heitið "Kjalarvatn", verður, 14. mai.

Tey, sum skipa fyri hesum báðum tiltøkunum, sum rættiliga fara at merkja bygdina hesar dagarnar í mai, eru Vestmanna Kirkjukór og Vestmanna Ítróttarfelag.

Umboða bygdina

Stigtakararnir siga, at samanlagt umboða Kirkjukórið og VÍF bygdina ógvuliga væl. Kirkjukórið er mannað við umleið 40 konum og gentum, og kórið hevur verið rættiliga virkið seinastu árini. Áhugin fyri at syngja er stórur, og tað er Erla Olsen, sum stjórnar Kirkjukórinum í Vestmanna.

Taka vit VÍF, so er hetta eitt av teimum stóru ítróttarfeløgunum í landinum við liðum í flestu hondbóltsdeildum. Felagið er eisini væl mannað í barnadeildunum í badminton og hevur haraftrat 3 virknar kappróðrarbátar, 10-mannafar, 6-mannafar og 4-mannafar. Felagið arbeiðir við at fáa nýtt 4-mannafar til komandi kappróðrarár og neystið, sum stendur í gerð, varð innilokað í summar.

Men tað kostar at reka eitt virkið felag, og tað kostar eisini at reka eitt virkið kirkjukór.

Eftir væleydnaðu konsertferðina hjá Kirkjukórinum í Íslandi seinasta summar, er ætlanin at fara til Álands at syngja við ikki færri enn 70 fólkum í ferðalagnum.

Óneyðugt er at siga, at eitt slíkt tiltak kostar nógvan pening, og ferðin skal fíggjast onkusvegna.

Tí standa bæði Kirkjukórið og VÍF saman um tiltøkini, sum verða í mai mánaði komandi ár.

Keyps-og sølustevnan

Keyps- og sølustevnan í Ítróttarhøllini í Vestmanna, vikuskiftið 2.-4. mai, verður ætlandi eitt sindur øðrvísi enn aðrar slíkar stevnur. Hendan fer serliga at venda sær til børn, ung og kvinnur. Tey, ið fara at sýna fram, fara í stóran mun at hava barnaklæði, barnaútgerð, leikur og konufólkaklæði við sær. Ætlanin er eisini, at peningastovnar og tryggingarfeløg skulu upplýsa um barna- og ungdómsuppsparingar og tryggingar.

Á sølustevnuni verður eisini tombola, matsøla og onnur tiltøk fyri børn.

Fyrireikararnir siga, at longu nú tykist stórur áhugi vera fyri sølustevnuni, og í næstum verður innbjóðing send fyritøkum og handlum, sum kunnu hugsast at verða við.

Men av tí, at fyrireikararnir neyvan finna øll, sum kundu hugsað sær at verið við, kunnu fyritøkur og handlar longu nú gera vart við seg og boða frá luttøku hjá Jógvan Sigurd Poulsen (tlf. 264539) ella hjá Birgiri Waag Høgnesen (tlf. 221577).

"Kjalarvatn"

14. mai verður so eisini skipað fyri bátastevnuni, "Kjalarvatn" og countrydansi í Vestmanna. Ætlanin er, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári.

Í mai í ár skipaðu Undirhúsið og Vestmanna Ítróttarfelag fyri fyrstu ferð fyri hesi stevnu og fyrireikararnir og tey, sum vóru við á stevnuni, siga, at tiltakið eydnaðist sera væl.

- Nógvar áheitanir eru komnar um at royna tiltakið aftur komandi ár, siga fyrireikararnir og leggja aftrat, at ætlanin er at gera meira burtur úr stevnuni hesaferð.

Sum skilst, at verða vestmenningar, at bátastevnan, "Kjalarvatn", skal bera brá av eini bygdastevnu, ið skal verða fyri øll - bæði tey, sum hava áhuga fyri bátum og fólk, sum hava onnur áhugamál.

Fyrireikararnir siga, at meira verður at frætta um sølustevnuna og bátastevnuna í Vestmanna sum frá líður.

15-20 útróðrarbátar á gólvinum í Klaksvík

Seinastu tíðina hava línuskipini fingið nógvan fisk undir Føroyum

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Eingi størri skip hava lagt veiðina upp á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík hesa vikuna, men talið av útróðrarbátum, sum hava selt fiskin á gólvinum, hevur ligið millum 15 og 20 um dagin, ávíkavist mánadagin, týsdagin og mikudagin.

Línubáturin, Skørin, er tann einasti størri báturin, sum hevur landað í Klaksvík fýra teir fyrstu dagarnar í vikuni. Ætlandi leggja teir 36.000 pund upp í dag, meginparturin er veiðini er hýsa.

Sagt verður, at fiskiskapurin hjá línubátunum undir Føroyum er góður, og tað hevur hann verið seinastu tíðina.

Á Fiskamarknaðinum vænta tey tó ikki, at línuskipini koma inn fyrr enn í komandi viku. Tey eru nýliga farin útaftur.

Útróður

Um várarnar, tá ið nógvir bátar eru á Norðhavinum, kunnu uppí 70 landingar verða á Fiskamarknaðinum í Klaksvík um dagin.

So stórt er bátatalið ikki, nú talan mest er um bátar, sum eru heimahoyrandi í Klaksvík og Hvannasundi, men er tað ein góður dagur, kann bátatalið tátta upp ímóti teimum 40.

Mánadagin, týsdagin og mikudagin hava í miðal einir 15-20 bátar lagt veiðina upp á Fiskamarknaðinum, og samlaða sølan á gólvinum hevur ligið um 120.000 pund um dagin.

Útróðrarbátarnir royna bæði við línu og snellu, og sagt verður, at meginpartin av veiðini hjá teimum, sum royna við línu, er hýsa.

Keyparar og prísur

Á Fiskamarknaðinum í Klaksvík verður sagt, at nógvir ymiskir keyparar eru til fiskin, og hesa vikuna hevur Norfra í Norðdepli keypt størstu nøgdirnar.

Afturvendandi keyparar á Fiskamarknaðinum í Klaksvík eru annars Kósin, Fiskavirkið í Gøtu, Fiskavirking á Toftum og Valhalla á Toftum.

- Annars eru keyparar úr meginpartinum av landinum her norðuri, siga tey á Fiskamarknaðinum.

Mikudagin kom prísurin á toski 1 uppí 26 kr. fyri kg., og tað er góður prísur.

Sum skilst, er prísurin á hýsu meira skiftandi enn á toskinum, og hetta avhongur av, hvussu stórur eftirspurningurin er her heima, og hvussu góður marknaðarprísurin er uttanlands.

Fiskamarknaður Føroya seldi í miðal eini 120.000 pund av útróðrarfiski mánadagin, týsdagin og mikudagin. Besti toskaprísurin mikudagin var 26 kr. fyri kg.

Mynd: Rúna Sivertsen